# Tríggir av avbjóðarum dumpaðu

*Avrikið hjá HB í Intertoto staðfestir, at í europeiskum høpi er føroyskur liðfótbóltur ikki nøkur hóttan fyri nakran sum helst*



*HB gjørdi dystin móti sandoyingum av sær mikukvøldið, og hóast talan gjørdist um ein tepran sigur, so víst tað seg tó at vera nóg mikið til at styrkja um oddastøðuna*

HB var í vikuskiftinum í Ungarn og gjørdi burturav sær í Intertoto Cup. Eingin spenningur var um úrslitið, tí í dystinum fyri einari góðari viku síðani á Tórsvølli, vann ungverska liðið 4–0.

Hóast tað ikki gekk nakað serligt á vøllinum, so kundu HBarnir, sum sunnudagin skulu manna seg upp at spæla steypafinalu móti GÍ, gleða seg um kærkomin tíðindi úr Føroyum, meðan teir vóru í Ungarn.

Eftir at landskappingin var hálvrunnin, vóru tað fimm lið, sum lógu tætt at hvørjum øðrum í kappingini um oddasessin. Hesi fimm liðini spældu í 10. umfarinum øll móti liðum longri niðri á støðutalvuni.

Longu mikukvøldið syrgdi HB fyri sínum stigum. Teir tunnu tepurt móti B71, styrktu um oddastøðuna og løgdu trýst á kappingarneytarnar.

Hini fýra liðini vóru í dysti um vikuskiftið. B68 kiksaði í Sørvági leygardagin, og B36 og KÌ, sum vitjaðu í Eysturoy sunnudagin, kiksaðu bæði. Sigrarnir hjá GÍ og NSÍ gera, at munurin millum aftaru liðini og tey í fremru røð ikki er tann í summarsteðginum, sum hann sá út til at fara at verða.

Vágbingar vóru teir einastu av fremru liðunum, sum í vikuskiftinum megnaðu at halda tørn í kappingini við HB.

### Dýrt móti teimum veiku

Síðsta heyst vístu vit á, at høvuðsorsøkin, til at HB ikki endurvann meistaraskapin frá 1998, var, at teir so ofta kiksaðu móti veikaru liðunum. HB stóð seg best í innanhýsis kappingini millum tey fýra fremstu, meðan teir høvdu nógv minst úrtøku móti hinum oddaliðunum.

Í ár tykist vera vent í holuni. Burtursæð frá javnleikinum í Runavík, so hevur HB ikki kiksað móti lægru liðunum. Í vikuskiftinum snávaðu B36, B68 og KÍ. Ikki minst hjá meistarunum úr Klaksvík hava dystirnir móti NSÌ verið dýrir. Í fyrsta umfarinum tapti KÌ við einum máli móti NSÌ – Jónstein Petersen skoraði sigursmálið. Aftur sunnudagin tapti KÌ við einum máli móti NSÌ, og aftur hesa ferð var tað Jónstein Petersen, sum skoraði sigursmálið. Um klaksvíkingar í heyst fara at resta seks stig í at endurvinna FM, so vita teir, hvar teir skulu leita eftir teimum!

Í fyrsta umfarinum eftir summarsteðgin – tað verður í ellinta umfarinum sunnudagin 6. august – skal HB til Klaksvíkar. Um KÍ hevði havt vunnið í Runavík, so høvdu teir við sigri á HB havt møguleika at komið upp um HB á støðutalvuni. Nú verður fyrsti dysturin eftir summarsteðgin ein spurningur um lív ella deyð hjá KÌ, sum skal vinna móti HB, um teir skulu hugsa um at endurvinna FM.

B68 var tætt við at tapa bæði í Gundadali móti HB og í Gøtu, men teir fingu seks stig burturúr. Leygardagin tveittu teir nakað av fyrimuninum av góðu úrslitunum í hesum útidystunum fyri borð aftur. Hóast teir – á sama hátt sum VB, B36 og KÌ – varðveittu plássið á støðutalvuni, so var tapið í Sørvági dýrt.

VB var sannførandi á jóansøku. Vágbingar eru framvegis heilt víst eitt gott boð upp á FM, og einki bendir á, at VB skal fara í aldudalin, sum teir ofta hava verið í eftir summarsteðgin. Um VB fer at resta trý stig í FM, tá stigakassin verður endaliga upptaldur á mikkjalsmessu, so kunnu vágbingar ásanna, at tað er dýrt at tapa móti teimum veiku. Her verður hugsað um kiksaran á heimavølli móti B71.

### Sumbingar á botninum

Sigrarnir hjá NSÍ og GÍ sunnudagin hava í fyrstu atløgu við sær, at tey í Eysturoy sleppa undan at hugsa um niðurflyting. Í fyrsta umfarinum eftir summarsteðgin skal NSÌ taka ímóti FS Vágar, og GÍ skal til Sumbiar. Umframt KÍ og HB skulu tvey onnur av toppliðunum – B36 og B68 – spæla í Gundadali. Tað vil við øðrum orðum siga, at vánirnar hjá GÍ og NSÌ eru ikki so heilt vánaligar at koma upp ímóti teimum, sum tær síðstu vikurnar hava tókst so langt burtur.

Sumbingar duttu leygardagin niður í botnin. Soleiðis sum gongdin hevur verið tær síðstu vikurnar er ikki ilt at ímynda sær, at tað verður sera strevið hjá Sumba at koma úr aftur botninum. 27. august skal Sumba til Sørvágs.

### Altjóða luttøkan

Í hesi vikuni er tað ivaleyst bara í HB og GÍ, at tað verður vant við fullari ferð. Liðini fyrireika seg til steypafinaluna, sum verður á Tórsvølli sunnudagin.

KÍ fer í komandi viku undir Europa Cup fyrireikingar, meðan tað í fleiri av hinum feløgunum verður gjørt lítið við venjingina í einar tvær vikur.

Umframt KÍ skulu GÍ og B36 taka lut í Europa Cup. Í leygardagsblaðnum umrøddu vit Europa Cup lutakastið. Í GÍ og B36 halda tey seg hava verið heppin, og tað er væl skiljandi út frá fíggjarliga og politiska sjónarhorninum. Men tað er sera lítið, sum bendir á, at ítróttarliga úrtøkan í Danmark og Svøríki fer at verða stórt frægari, enn hon fer at verða hjá KÍ, sum skal til Jugoslavia.

Fleiri ferðir áður hava vit staðfest, at føroyskur liðfótbóltur er lítið verdur í altjóða høpi. Avrikið í Intertoto Cup hjá oddaliðnum í heimligu landskappingini undirstrikaði henda veruleikan. HB tapti tilsaman 0–7 móti lítið kendum ungverskum liði. Tað var ikki gott. Serliga tá havt verður í huga, at mótstøðumenninir undan dystinum í Føroyum høvdu havt summarfrí í fleiri vikur, meðan HB hevur spælt seg upp á oddasessin í heimligu kappingini.

Tað telur heldur ikki rætta vegin fyri føroyska avrikið, at næstsíðsta sunnudag tapti HB 4–0 á heimavølli móti einum liði, sum hevði ferðast langt og nógv og sum so at siga kom beinleiðis úr flogfarinum og á grasvøllin í Gundadali.

JH



*Millum annað fingu teir hjálp frá GÍ, sum á heimavølli basti B36. Eisini KÍ og B68 máttu taka til takkar við tapið, og sostatt var tað bert VB av hinum oddaliðunum, sum megnaði at fylgja við HB*



# Kortspæl í Gøtu tá dómarin kom í fokus

*Rættuligt rok varð í Gøtu sunnudagin, men tíverri stóðst hetta av vánaligum dómaraavrikum, heldur enn góðum leikaraavrikum*



*Jørgin Meitilberg er í løtuni heima í summarfrí, og hann var aftur at síggja í B36 álopinum, har tað tó ikki eydnaðist at fáa nakað mál burturúr*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Jákup Mørk

GÍ-B36 1-0 (0-0

Mongu havnarfólkini, sum sunnudagin nýttu góðveðrið til at fara ein túr í Sarpigerði, vóru alt annað enn fegin, tá dómarin hevði bríkslað fyri seinastu ferð í dystinum millum GÍ og B36.

### Dýr dómaramistøk

Ónøgdin var ikki bara orsakað av, at B36 noyddist stigaleyst aftur til Havnar. Heldur var tað mátin, sum B36 tapti dystin upp á, sum elvdi til ónøgdina.

Fyrst og fremst vóru tað nevnliga tvey dómaramistøk, sum vóru atvoldin til GÍ sigurin. Tá seinni hálvleikur var á leið hávlrunnin, hevði B36 havt bóltin í GÍ málinum, men onkursvegna helt linjuverjin, at talan var um rangstøðu.

Nakað seinni sendi Óli Hansen bóltin í B36 málið, og hetta málið varð góðkent, hóast so at siga allir áskoðararnir vóru samdir um, at talan tá var um rangstøðu.

Fyri at geva sína hugsan til kennar, fór liðskiparin hjá B36, Jens Kristian Hansen, til linjuverjan, men hann hevði vallað fingið talað, fyrr enn Petur Hansen gav honum næsta gula, og harvið reyða, kortið.

Ónøgdin hjá B36 leikarunum gjørdist sum vera man ikki minni um útvísingina, og sum úrslit av hesum, fekk eisini Mikkjal Thomassen tvey gul kort, soleiðis at B36 leikararnir nú máttu spæla við níggju monnum seinasta korterið.

### Linligur dystur

Fram til hendingina við málinum og kolldømdum málinum, hevði sum so ikki verið tann stóri futturin í dystinum.

Í fyrra hálvleiki var tað GÍ, sum í nógv størstan mun stýrdi spælinum. Mál fingu teir tó ikki burtur úr, tó at Helgi L. Petersen var sera nær við, tá hann tveitti seg fram og stútaði á stongina.

Tað tóktiskt annars løgið, at B36 var somikið veik, tá skrábóltar vóru sendir úr síðunum. Fleiri ferðir var eisini um reppi, at talan varð um heilt vandamiklar støður, men tað eydnaðist so ongantíð gøtumonnunum at fáa nakran avgerandi møguleika.

Í hinum endanum vóru teir svørt/hvítu rárir gestir, men teir høvdu kortini ein risamøguleika, tá bólturin varð rullaður aftur til Ronnie Samuelsen, sum úr 11 metrum sendi langt upp um málið.

### Gjæørdist javnari

Fyrsta 10-15 minuttirnar av seinna hálvleiki var gongdin framvegis hin sama, men so við og við kom B36 betri við i dystinum.

Á miðvøllinum fingu teir nú fatur á nógv fleiri bóltum, og tað var eisini meira bit í, tá teir nú royndu at vinna sær niðan eftir vøllinum.

Teir fingu eisini skapt sær nakrar vandamiklar støður í GÍ brotsteiginum, men hinvegin fekk GÍ nú eisini betri rásarúm í álopinum, og nú kom av álvara lív í dystin, sum annars hevði verið heldur tamur meginpartin av fyrsta tímanum.

Tað var eins og hvørgin parturin var nøgdur við ein javnleik, og tá hálvleikurin var á leið hálvrunnin, var líkt til, at Magni á Lakjuni hevði lagt gestirnar fram um.

Sum nevnt omanfyri, so varð málið tó kolldømt, men hvussu linjuverjin kom til ta niðurstøðu, at Magni var rangstaddur, tykist heilt ótrúligt.

Tá so GI fekk mál lítla løtu seinni, kókaði fullkomuliga yvir hjá gestunum. Málið kom, eftir at bólturin hevði ferðast eitt sindur í B36 brotsteiginum, og tá hann at enda varð stútaður móti málinum, stóð Óli Hansen inni undir málinum og setti seinasta fótin á bóltin.

Sum nevnt, so endaði alt við, at tveir B36 leikarar vórðu riknir av vøllinum, men hóast teir sostatt vóru undirmannaðir seinasta partin av dystinum, so megnaðu teir at leggja eitt ávíst trýst á GÍ málið. Eina ferð vildur teir vera við, at talan var um brotsspark, men floytan hjá dómaranum tagdi.

### Pelle í øðini

At siga, at B36 venjarin, Per Olav Andersson ella Pelle, var illur eftir dystin, er so ikki at taka munnin ov fullan.

Sviin var í øðini um dømingina í dystinum, sum eftir hansara tykki fullkomuliga hevði oyðilagt dagin hjá havnarmonnunum.

Serliga vóru tað tey bæði málini, sum orsakaðu hesa misnøgdina. – Vit venja hart og miðvíst hvønn tann einasta dag, og so verður alt arbeiðið spilt á ein slíkan hátt. Tað tykist heilt ófatuligt, tí tað er altso fremstu fótbóltsdeildina í landinum, at talan er um, helt ein vónbrotin B36 venjari fyri eftir dystin.

Eitt, sum hann ikki nevndi, men sum ivaleyst eisini fer at geva svianum høvuðbrýggj, tá kappingin verður uppafturtikin eftir summarsteðgin, eru tey bæði leikbannnini, sum B36 fekk burtur úr dystinum. Bæði Jens Kristian og Mikkjal hava týdningarmiklar leiklutir á B36-liðnum, men komandi dystin verða teir báðir so ikki tøkir hjá venjaranum.

### Høvdu tað uppiborið

Sunnukvøldið fingu vit orðið á Petur Hansen, sum dømdi dystin, og sum seinastu løtuna rættuliga var í andgletti.

Um tey bæði reyðu kortini helt hann, at teir báðir leikararnir fingu tað, sum teir høvdu uppiborið, tí teir vita av, hør revsingin er fyri at munnhøggast við dómara og hjálpardómara.

At øsingin komst av, teimum báðum støðunum, har mál hjá B36 varð kolldømt og tað hjá GÍ varð góðkent, var Petur greiður um, men hinvegins segði hann seg hava dømt eftir bestu sannføring. – Linjuverjin stendur betri fyri enn eg, og eg má sjálvandi hava álit á teimum metingum, sum hann hevur gjørt av støðuni, var tað, sum leirvíkingurin hevði at siga um mest umtalaðu hendingarnar í dystinum.

### Nógv skal betrast

Við sigrinum fekk GÍ trý hart tiltrongd stig, og so er spurningurin, um hetta var byrjanin til eina longri klintran upp eftir stigatalvuni.

Undanfarnu árini hava í øllum førum lært okkum, at gøtumenninir ongantíð skulu avskrivast heilt. Gullmerki verður tó neyvan talan um í ár. Í øllum førum ikki landskappingini. Í steypakappingini hava teir tó møgueleikan, tá teir komandi sunnudag skulu á Tórsvøll, har HB er mótstøðuliðið. Skal GÍ gera sær vónir um at vinna tann dystin, skal avrikið helst vera betri enn tað var sunnudagin, tí tað kann ikki roknast við, at teir fáa somikið góða hjálp frá dómaranum tveir dystir á rað.

Ikki tí, sæð yvir allar 90 minuttirnar, var tað sum so í lagi, at GÍ fekk stigini, men fyri fótbóltin er at vóna, at tað verða leikligu avrikini, og ikki tey hjá dómaranum, sum koma at verða avgerandi fyri dystin.

**GÍ-B36 1-0 (0-0)**

1-0: Óli Hansen 78.

Dómari: Petur Hansen

**GÍ:**
Sunnvard Joensen – Pól Ennigarð, Bartal Eliasen, Martin Thomsen – Súni Olsen, Pauli Jarnskor, Magni Jarnskor, Henning Jarnskor – Hans Pauli Petersen, Helgi L. Petersen, Óli Hansen

**B36:**
Tróndur Vatnhamar – Mikkjal Thomassen, Egil Zachariassen, Jens Kristian Hansen – Håkan Lundholm, Jan Guttesen, Klæmint Matras, Magni á Lakjuni – Jákup á Borg, Ronnie Samuelsen, Jørgin Meitilberg

# B36 aftur fingið ferð á

*2. deild: Næstbesta liðið hjá árstalsfelagnum hevur rættuliga fingið ferð á seinastu dystirnar.*

Jákup Mørk

LÍF-B36 0-1 (0-1)

Tað var við vónunum um eitt stig, at B36 um vikuskiftið vitjaði í Leirvík.

Undan kappingini vóru leirvíkingar mettir millum sterkastu liðini í deildini, og var hetta millum annað grundað á, at teir bæði í fjør og fyrraárið royndu seg í upp- og niðurflytingardystum móti sumbingum.

B36 flutti upp úr triðju deild í fjør, og fremsta mál teirra undan kappingini mundi helst vera at halda sær omanfyri niðurflytingarstrikuna.

### LÍF trysti uttan úrslit

Sum so vóru tað eisini leirvíkingar, sum sýndu størri vilja at vinna dystin leygardagin.

Nakað av vindi var eftir vøllinum, og hetta darvaði eisini spælinum nakað. Tað spælið, sum var, stóðu leirvíkingar tó fyri, og tað var rættuiga ofta, at nógv stóð á B36 verjuni, men í Rene Tórgarð hevði liðið ein sera tryggan aftasta skansa, sum tók sær av øllum tí, sum leirvíkingar tveittu fram ímóti honum.

Mitt í øllum trýstinum frá leirvíkingum eydnaðist brádliga B36 at leggja seg á odda, tá Johnny Samuelsen hevði seinasta fótin á eftir trunkaspæl.

Í seinna hálvleiki royndu LÍF leikararnir at trýsta alt tað, teir vóru mentir, men úrslitið broyttist tó einki.

Fegnir kundu B36 leikararnir fara heim aftur til Havnar, meðan teir ásannaðu, at teir nú eru um at vinna seg upp á heiðursmerkjapláss.

Her eru leirvíkingar ikki enn at síggja, men munurin millum ymsu liðini á talvuni er sera lítil, og enn kunnu leirvíkingarnir so langt ífrá avskrivast.

**LÍF-B36 0-1 (0-1)**

0-1: Johnny Samuelsen